## Polarhav og Stjørnan í Saltangará

Leirvíkstrolararnir Polarhav og Stjørnan landa í Saltangará í morgun. Hetta er fjórði túrurin hjá teimum á gulllaksaveiði. Veiðan er 620 kør, og tað eru eini 370.000 pund tilsamans. Skipini, sum hendan túrin hava roynt í eina viku, taka 750 kør tilsamans, so teir eru ikki fulllastaðir. Teir báðar fyrstu túrarnar, sum vardu í umleið eina viku hvør, vóru skipini full undir lúkurnar. Á landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltangará siga tey, at svartkjaftur hevur verið uppi í gulllaksinum, og hetta hevur tarnað skipunum nakað. Vestmenningur og Fram, sum eisini hava lagt um til gulllaksaveiði, eru júst byrjaðir at fiska. Skipini hava verið ein stuttan túr, har tey hava roynt útgerðina, og nú eru tey so farin útaftur at royna. Ætlandi fara Vestmenningur og Fram at leggja veiðina upp til nýggja gulllaksavirki í Vestmanna.



# Nýtt tilboð til matglaðar føroyingar

**Síðst í mánaðinum letur café-líknandi matstovan Patio upp. - Vit fara at leggja stóran dent á høga góðsku og góða tænastu, siga eigararnir, systkini Sigrun og Kári Davidsen**

MATSTOVA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Tað eru systkini Sigrun og Kári Davidsen, sum eiga nýggju matstovuna við Niels Finsensgøtu*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað verður smíðað og málað av øllum alvi á niðastu hædd í bygninginum beint niðanfyri AUTO. Hølini hava tikið skap og sjálvt um tú ikki visti tað, kundi tú gitt, at talan er um eina matstovu. Ella eina matstovu/café/barr, sum eigararnir, systkini Sigrun og Kári Davidsen kalla tað.

Kári Davidsen hevur starvast nógv innan yrki, tá hann læs jura niðri í Danmark, meðan Sigrun Davidsen er meira óroynd á økinum.

- Vit meta avgjørt, at tað er tørvur á einum staði í býnum, sum er eitt millumting millum pylsuvogn og fýrastjørnaða matstovu, sigur Kári Davidsen.

Hann verður bert við sum eigari. Til gerandis starvast hann sum sakførari í Danmark.

- Sjálvt umhvørvið verður annarleiðis enn vit vanliga síggja í Føroyum. Talan verður um eina meira nýmótans, trendy innrætting av hølunum, sigur Sigrun Davidsen, sum verður dagligur leiðari á Patio.

Tey ætla at leggja stóran dent á høga góðsku og góða tænastu.

- Vit fara eitt nú at serútbúgva okkum innan kaffibrygging. Tað skilst á útlendingum, at tað ber ikki til at fáa ein góðan café latte í Føroyum, sigur Kári Davidsen.

Tey bæði rokna við, at fáa brúk fyri umleið 20 fólkum tilsamans at starvast á Patio, og tey allarflestu eru longu sett í starv.

### Skeinkiloyvi

Tað fer so at bera til at fáa mong ymisk sløg av kaffi á Patio, umframt at tú kanst keypa tær ein betri bita. Matarkortið er í løtuni við at verða fínpussað, og annars vilja tey ikki enn siga, hvussu tað fer at síggja út.

Men tað verður eisini ein triði møguleiki hjá gestunum.

- Vit fara eisini at hava eina barr við barrvørðum, og ætlanin er at hava leingi opið um vikuskiftini, sigur Kári Davidsen.

Tey hava fingið prinsipielt skeinkiloyvi.

- Endaligt skeinkiloyvi fáa vit ikki fyrr enn hølini eru liðugt inrættað, sigur Sigrun Davidsen.

Tað verður ikki loyvt at roykja innandura, men tað bøtist við, at gjørd verður ein terassa við markisu uttanfyri, og har verða borð og stólar sett upp, so har ber til at roykja hjá teimum, sum hava trongd fyri tí.

- Vit rokna við at hava pláss fyri 50 gestum at sita innandura, og vænta at eini 20-30 fólk kunnu sita uttandura, sigur Sigrun Davidsen.

Nýggja caféin/matstovan/barrin letur upp síðst í mánaðinum.

# Ein slutur fyri ein slatur

**Jacob Vestergaard er ikki serfliga imponeraður av svarinum hjá løgmanni, sum hann skírir »ógvuliga tunt«**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í stuttari viðmerking til Sosialin sigur Jacob Vestergaard, at svarið hjá løgmanni ikki er serliga ítøkiligt.

Svarið er ógvuliga tunt. Løgmaður viðgerð als ikki trupulleikarnar. Í staðin sigur hann, at hann ikki kann viðgera privat viðurskifti hjá Torbjørn Jacobsen, men tað er í stórari andsøgn við tað sum hendi Jóhan Dahl, har tað júst vóru privatu viðurskiftini, sum førdu til, at løgmaður loysti hann úr starvi, sigur Jacob Vestergaard.

Víðari vísir Jacob Vestergaard á, at løgmaður hevur almentheitt á landsstýrisfólk um at upplýsa alment um teirra privatu viðurskifti og heitt á løgtingsformannin um at heita á tinglimir um at gera tað sama.

So í stuttum kann sigast, at svarið hjá løgmanni er ein slutur fyri ein slatur, sigur Jacob Vestergaard, løgtingslimur hjá Fólkaflokkinum, sum setti fyrispurningin fram.



*Jacob Vestergaard er ikki serliga nøgdur við svarið, sum løgmaður gav honum upp á fyrispurning um privatu viðurskiftini hjá Tórbjørn Jacobsen*